VALGREINAR

Lágskattasamfelagið og vælferðin

Vilhelm Johannesen
valevni javnaðarfloksins í Norðoyggjum

Tað er bæði rætt og rímiligt at veita skattalætta til lág- og miðalinntøkurnar. Eisini er tað rætt at bøta um lívskorini hjá barnafamiljunum við at hækka barnafrádráttin.

Meirvirðisgjaldsskipanin og allar aðrar avgjaldsskipanir skulu endurskoðast. Meirvirðisgjaldið skal lækka niður í 23%.

Hetta vilja vit í javnaðarflokkinum, men fólkaflokkurin tosar um at gera Føroyar til eitt lágskattaland. Vit kenna fleiri lágskattalond í heiminum. Vit kenna lágskattalond í Mið- og Suðuramerika, í Afrika og í fjareystri. Har gjalda fólk nærum ongan skatt, men har er heldur ongin vælferð, har eru ongar vælferðartænastur.

Hetta eru alt u-lond, har neyð, armóð og fátækradømi valdar. Ein má sjálvur gjalda fyri læknahjálp, fyri viðgerð á sjúkrahúsi, fyri útbúgving, fyri flutning o.s.fr. Tey vælbjargaðu – tey múgvandi, megna sjálvsagt at gjalda fyri seg, men øll hini, tey detta niður ímillum. Og orsøkin er júst tann, at hetta eru lágskattalond, ið ikki hava ráð til vælferð og vælferðartænastur.

Rætturin til eina íbúð er bert galdandi fyri tey ríku - tey væl bjargaðu, tey múgvandi. Íbúðin hjá øllum hinum, er úti á gøtuni, undir opnum himni eins og himmalsins fuglar. Tey vælbjargaðu, tey ríku og múgvandi hava tað gott, tí tey sleppa undan at rinda skatt til ymiskar vælferðartænastur. Eitt dreymaland fyri tey – ja, eitt satt paradís, men ein ræðuleiki fyri øll hini.

Politiska kósin hjá fólkaflokkinum er at gera Føroyar til eitt u-land við ongari vælferð og ongum vælferðartænastum til landsins íbúgvar. Hesum er javnaðarflokkurin hart ímóti. Vit vilja stríðast við hond og fót og til síðsta blóðdropa ímóti einum slíkum samfelag.

Javnaðarflokkurin vil varðveita, útbyggja og menna vælferðarsamfelagið. Tí fara vit mannsterk á val og seta ein sterkan javnaðarflokk á løgting komandi týsdag. Seti X við lista C ella eitt av valevnum javnaðarfloksins.

Tøl, ið tala 2

Edmund Joensen
løgtingsmaður Sambandsfloksins

Landsstýrið hevur leingi roynt at gjørt eina mynd av sær sjálvum, umboðandi skil í peningamálum. Henda talvan sigur betur enn orð kunnu gera tað, hvat veruleikin er. At alt figgjarskil sum Sambandslandsstýrið setti í verk, er at Loysingarlandsstýrinum fyri langari tíð síðani tveitt fyri borð.

Tvey løgting á rað samtyktu eina nýggja stýrisskipanarlóg. Játtanarreglur av strangasta slag vóru settar í verk. Ætlanin hjá undanfarnu løgtingum og landsstýrum var at óskilið við ótálmaðum eykajáttanum skuldu við hesum tiltøkum effektivt steðgast.

Sum tølini eisini vísa, var skil komið á undir Sambandslandsstýrinum. Stórar eykajáttanir vóru vorðnar søga. Rakstrarútreiðslurnar vóru hildnar, og eykajáttanir vóru bert slakar 12 mió. krónur fyri alt árið 1997.

Sannast má, at ongin skipan virkar betur enn tann manningin, sum er sett at umsita hana. Sum talvan omanfyri so týðuliga sigur frá, so hevur landsstýrið svikið, eisini á hesum álvarsliga øki. Eykajáttanir eru vornar reglan heldur enn undantakið, og óskilið hevur bara tikið til.

Seinastu eykajáttanirnar áðrenn løgtingið fór heim, eru ikki tiknar við í talvuna omanfyri. Tær høvdu sjálvsagt gjørt talvuna ógvusligari skeiva vegin. Flestu minnast yvirskriftina »Lokið farið av landskassanum«, og tá sjálvur løgtingsformaðurin segði, »skal tað vera gyldi, so lat tað vera gyldi«!

Vit onnur mugu bara hyggja at leikinum, rista við høvdinum og siga fyri okkum sjálvum, at »disse regeres vi af«, og vóna at tit minnast alt hetta á valdegnum.

Ein góð Heimastýrislóg

Eirikur Dam
Valevni Sambandsfloksins í Norðstreymi

Góðu føroyingar, nú eru bert fáir dagar eftir til tit skulu gera av hvørjir flokkar skulu mynda eitt komandi løgting. Tey seinastu 4 árini hendan fullveldissamgongan hevur sitið, siga teir, at tað hevur gingið so sera væl, men teir nevna ikki, at tað er undir heimastýrislógini teir hava stýrt, tí í Føroyum er einki fullveldi. So teir mugu viðganga, at heimastýrislógin er eitt gott amboð sambært teirra reypi.

Samgongumenn siga, at kemur millum annað Sambandsflokkurin framat, so verður landskassin tømdur. Men góðu føroyingar, verði ikki bangnir fyri tí. Sambandsflokkurin hevur altíð dugað at stýrt figgjarmálum, tá hann hevur havt tey um hendi, tað er so ofta prógvað.

Tá saman um kemur er ikki so nógv avlop í landskassanum, tað er ein knøpp milliard, tí tann 1,6 milliardin, ið eftir er, má standa ikki um bankatreytin skal vera í lagi.

Tað verður nógv at taka hond um hjá komandi samgongu, ið skal taka við eftir hetta stýrið. Sambandsflokkurin bjóðar seg fram at stýra hesum landi, so vit kunnu liva trygt í hesum landi. Tað er galdandi fyri allar samfelagsbólkar, vinnubæði á sjógvi og landi, gomul, sjúk og ikki minst tey brekaðu, og tey ungu í teirra læruyrki, familjulív og andslív. Her eru bert nøkur fá av nógvum málum flokkur okkara hevur á skránni.

Góðu landsmenn og kvinnur, viljið ein sterkan Sambandsflokk á ting, hann stendur við ábyrgd og heldur sítt lyfti.

Gott val.

Ungdómurin er stórsta tilfeingið vit eiga

Eliesar Poulsen
valevni Javnaðarfloksins í Hvalba

Tað komandi ættarliðið er ein av teimum berandi súlunum í einum og hvørjum samfelag í menning. Søgan hevur víst, at samfeløg har ungdómurin hevur mistrivist ella ikki hevur havt møguleikar at ment seg, ikki hevur átt nakra framtíð.

Samfelagið hevur hesi síðstu hálvthundrað árini verið fyri kollveltandi broytingum.

Vanliga mynstri er nú, at foreldrini arbeiða úti, og hetta førir við sær, at ansingin av okkara komandi ættarliði verður latin til samfelagið at taka sær av.

Hetta hevur so aftur við sær, at fleirtalið av okkara ungdómi ein stóran part av tíðini verður ælt upp uttan fyri heimið, meðan talið av teimum, ið vaksa upp við heimagangandi foreldrum fækkast í stórum.

Verandi gongd setur sera stór krøv til samfelagið. Stovns- og ansingarpláss til unga ættarliðið skulu útvegast.

Tað er somuleiðis sera umráðandi, at samfelagið bjóðar børnum og ungum ein so góðan fólkaskúla sum gjørligt. Ongantíð hevur tað verið meira umráðandi enn júst nú, at ungdómurin fær eitt gott støði at standa á, tí útbúgvingarkrøvini gerast alt fleiri og fleiri.

Tað er ein farin tíð, har sigast kundi, at tann, ið ikki kláraði seg bókliga, kundi brúka hendurnar. Sjálvsagt er tað sera týðandi at hava góðar handverkarar, men nýggja tøknin setur heilt onnur krøv til handaligu útbúgvingarnar enn fyrr. Tøknin mennist og broytist alla tíðina. Teldan er vorðin ein stórri partur av amboounum, ið vera nýtt í vinnuni, og grundlærdómurin til nýggju tøknina skal leggjast í fólkaskúlanum.

Verandi gongd setur somuleiðis samfelagnum enn stórri krøv, tá tað snýr seg um undirvísing til børn og ung við serligum tørvi. Hesir næmingar mugu fáa eina enn stórri hjálp enn í dag, um teir skulu megna at klára seg í framtíðar samfelagnum.

Bólkurin av veikum næmingum í fólkaskúlanum økist munandi, og hugtakið »skúlin fyri øll« er tíverri bert møguligur á pappírinum, tí umstøðurnar eru ov vánaligar, og játtanin síðstu 10 til 20 árini til serligan tørv hevur bert verið frá einum triðingi til eina helvt av tí, hon átt at verið, um tørvurin skal nøktast.

Henda skeiva gongd hevur tíveri havt við sær, at fleiri eru farin úr fólkaskúlanum sum taparar, og tað hevur okkara lítla samfelag ikki ráð til. Øll børn eiga at fáa undirvísing á sínum serliga støði, so tey kunnu kenna, at tað er brúk fyri teimum, tá tey gerast vaksin.

Málið má vera, at flest øll skulu fáa eina útbúgving, sum hóskar til teirra.

Ungdóminum skal standa í boði útbúgvingarmøguleikar í miðnámsskúlum úti um landið. Best er, at ungdómurin kann vera sum longst í heimbygdini ella nærumhvørvinum, tí so vera tey nærri knýtt til heimstaðin, og tey fáa eitt gott grundstøði fyri eini framhaldandi útbúgving og menning av heimaumhvørvinum.

Tað skal vera eitt krav, at øll skulu hava møguleika fyri útbúgving uttan mun til figgjarførleikan hjá foreldrunum, og um tey skulu ferðast til útbúgvingarstaðið, skal nøktandi studningur gevast til hesa ferðing.

Nevndu krøv til samfelagið eru av stórsta týdningi fyri, um vit sum samfelag kunnu verða við í kappingini á altjóða støði, tí dýrasta og størsta ognin okkara samfelag eigur, er ein vælútbúgvin ungdómur, tað verður seg bókligt ella handaligt. Ein ungdóm, ið kann føra førningin longur fram á vegin.

Javnaðarflokkurin fer at gera alt tað, sum er møguligt, fyri at tryggja okkara komandi ættaliði so góð og mennandi kor, so Føroyar kunnu vera eitt gott og framkomið land at arbeiða og búgva í.

Set ein sterkan Javnaðarflokk á ting við at seta X fyri lista C.

VALGREINAR

Nýggj lending í Mykinesi

Jóanis Nielsen
Valevni Fólkafloksins í Vágum

Greitt er, at sera fáir íbúgvar eru eftir í Mykinesi. Fá fólk í arbeiðsførðum aldri, nøkur eldri fólk, men tað gleðiliga er tó, at nú eru tvey børn í Mykinesi. Hetta eru tó alt ov fá til at endurnýggja búsetingina, og tískil verður neyðugt við tilflyting, skal Mykines ikki verða avtoftað.

Av teimum19 íbúgvunum í Mykinesi búgva bert 9 í oynni. Tey, sum búgva í Mykinesi halda, at tað eru fleiri, ið vilja seta búgv í Mykinesi, um bert nøkur grundleggjandi viðurskifti vórðu broytt, og umstøðurnar vóru fyri bústaði og vinnu.

Fólka- og farmaflutningur

Í nógv ár hevur tað verið ein stórur trupulleiki, at einki líknandi skip hevur rokt rutuna vestur í Mykines, – Súlan er ótíðarhóskandi – men so leingi lendingarviðurskiftini eru sum tey eru, er ikki hugsandi, at stór framstig verða gjørd við ferðafólka- og farmaflutningin á farleiðini.

Nýggj lending á Hellisgjógv

Niðri á gjónni, har Súlan leggur at, er so mikið grunt, tá ið fjørða er, at báturin stendur á stórum steinum. Eisini er sera avmarkað, hvat kann gerast á gjónni, tí haldi eg at neyðugt verður at kannað aðrar møguleikar.

Á Hellisgjógv eru sera góðir møguleikar at gera lending. Vegur má gerast yvir til gjónna. Á Hellisgjógv er bládýpi í klettin, lætt skuldi verið við teimum amboðum sum í dag eru at skotið ein góðan slættan kant til atløgubryggju, her kundi ein góð bílig loysn fingist.

Tí er mín metan at arbeiðast má fyri at fáa nýggja lending á Hellisgjógv, soleiðis at møguleiki verður hjá eini komandi vinnu at kunna fáa alt tilfar, sum brúk er fyri til oynna, og somuleiðis lætt at kunna sleppa av við tað, sum framleitt kemur at verða.

Góð vinnulig hugskot tróta ikki, men hetta er alt treytað av politiskum vilja til at gera broytingar. Sum sagt verður í Mykinesi, »Tað verður neyðugt at vera avgjørdur, og tað ber ikki longur til at ganga í smáum skóm«.

Miðflokkurin atkvøddi fyri at yvirtaka málsøki fyri 366 mill.kr.

Jákup Lamhauge
valevni sambandsflokksins í Eysturoy

Á veljarafundinum í Runavík týskvøldið 23. apríl vísti undirritaði á hvørjir flokkar atkvøddu fyri málinum um yvirtøku av figgjarligu ábyrgdini av Skúlamálunum og almennu forsorgini hvørs avleiðing varð, at stuðulsveitingin frá ríkinum lækkaði við 366 mill. kr.

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið sigur Høgni Hoydal, sum legði málið fram vegna samgonguflokkarnar, at útrokningar hjá Figgjarmálastýrinum vístu, at skúlamál kostaðu 261 mill.kr.og almenn forsorg 95 mill kr. ella tilsamans 356 mill. kr. - sum síðan er rætta til 366 mill. kr.

Umboðið fyri Miðflokkin, Bill Justinussen, noktaði fyri at teirra flokkur hevði atkvøtt fyri málinum – ella v.ø.o legði undirritaða undir at siga ósatt.

Aftaná at omanfyri nevnda mál hevði fingið 1. viðgerð í tinginum fór tað til viðgerðar í uttanlandsnevndini, og býtti nevndin seg í fýra minnilutar.

Umboðini fyri samgonguna tóku undir viðmálinum, umboðini fyri sambandsflokkin og javnaðarflokkin tóku ikki undir við málinum, meðan fjórði minnilutin, Jenis av Rana fyri Miðflokkin, tók undir við uppskotinum.

Málið kom til aðru og triðu viðgerð ávikavist 21. og 28. september og varða samtykt við ávikavist 18 atkvøðum fyri og 9 atkvøðum ímóti við 2. viðgerð og 19 atkvøðum fyri og 10 atkvøðum ímóti við 3. viðgerð.

Teir sum atkvøddu fyri málinum vóru tinglimirnir fyri samgonguna og síðan eisini umboðið fyri Miðflokkin, Jenis av Rana.

Hugsjónir ella ræðumyndir

Eyðgunn Samuelsen
valevni Javnaðarfloksins í Norðoyggjum

Tjóðveldisflokkurin er farin undir eina lýsingarherferð mótvegis sambands- og Javnaðarflokkinum, vit lesa í teirra lýsing í Norðlýsinum:

Vil tú søpla alt burtur vel so Sambands- ella Javnaðarflokkin!! og viðari siga teir: Teirra fremsta endamál ar at skapa einar ósjálvbjargnar Føroyar, einar Føroyar við onki megna,duga ella kunna. Besti háttur at náa hesum máli, er at søpla alt burtur og koyra samfelagið út í eina nýggja kreppu og so siga:

»Hygg, vit søgdu tað altíð, Føroya fólk megnar ikki at standa egnum beinum.«

Burtursæð frá, at hetta er ein ótrúliga ósaklig lýsing, so er hon sjálvandi ikki rætt og tað vænti eg at Føroya fólk skilur uttan nærri frágreiðing!!

Er hetta tað fair play ið formaður tjóðveldisflokksins tosar um? vit eru nógv, ið standa spyrjandi. Hann hevur gingið á odda við, at allir hinir flokkarnir júka ræðumyndir fram, men um hetta er støðið fyri politiskt orðaskifti í hansara flokki, so veit eg ikki hvussu veljarin skal hava álit á teimum.

Tá ein, ið ramasta álvara kann seta eina slíka ræðumynd fram fyri at fáa atkvøður, so kann ein loyva sær at ivast í sakligheitini í restini av tí ið teir føra fram.

Ynskir tú ein sakligan politik ið byggir á hugsjónir velur tú Javnaðarflokkin!

Eydgunn@post.olivant.fo

Ágrýtni og sjálvsvirði

Elsa í Garði
valevni Fólkafloksins í Suðurstreymi

Røða hildin á kvinnupolitiskum fundi 20. apríl í Havn

– Eg lærdi til sjúkrasystir í Danmørk. Í míni útbúgving var eg í starvsvenjing á Læbe- Gane- Gummespalte barna- og ungdómsdeild.

– Mær dámdi sera væl tíðina har, og tá ið eg skuldi gevast og fáa umdømið, varð eg biðin um sjálv at døma um mítt avrik. Eg gjørdist sera illa við, tí eg hevði aldri roynt hetta fyrr, at skula siga nágreiniliga hvat eg helt um meg sjálva.

– Seinni í míni næmingatíð var eg á Finsen. Eg minnist væl, tá ið eg skuldi »evaluerast« seinastu ferð: Eg byrjaði við at siga, at eg helt at eg skuldi fá toppkarakter, og eg grundgav tað fyri hvørt einkult mál.

– Eg fekk toppkarakter, tí prógdómararnir vóru púra samdir við mær.

– Út frá hesum báðum dømum kanst tú spyrja:

Hvat hevði eg lært?

Jú, eg hevði lært at seta mær eitt mál, og at halda fast við málið. Eg var ágrýtin og fekk eitt gott úrslit, – og eg hevði lært at meta um og virðismeta meg sjálva!

– Hevur tú sett tær eitt mál í lívinum?

– Eg havi!

Í gjár var 10-ára stovningardagur fyri onkologisk ambulatorium. Í tí sambandi var eg biðin um at halda ein fyrilestur um »Look Good – Feel Better« átakið, sum ætlanin er at seta í gongd í Føroyum.

Kanningar hava víst, at kvinnur kenna størri vælveru og fáa styrkt sjálvsálitið, um tær undir sjúkralegu fáa møguleika at røkta útsjóndina.

Í bókini hjá Eiler Jacobsen: »Skálavíksdrongur - Sildakongur« sigur hann soleiðis:

»Okkara tvørrandi sjálvsálit hevur nívt okkum sum fólk og tjóð.«

– Men hvat hevur hetta, at seta sær eitt mál, ágrýtni og sjálvsálit við politikk at gera? Og kanska serliga fyri okkum kvinnur?

– Jú, eg haldi, at um ein kvinna hevur meiningar um politikk, hví so ikki gera seg galdandi har tær stóru avgerðirnar verða tiknar.

– Vit kvinnur hava serligar lívsroyndir. Vit eru kanska mammur og ommur. Eisini hava vit í ein vissan mun serligar útbúgvingar so sum: læknar, sjúkrasystrar, pædagogar, social-ráðgevarar osfr. umframt, at nógvar kvinnur reka smávirkir og handil.

– Hvat kunnu vit brúka hetta til í politikki? Jú, um fleiri kvinnur vera valdar inn á ting, kunnu vit í felag ávirka tey tungu økini so sum Almanna- og Heilsumál. Familju- og Ungdómspolitikk, Eldrarøkt og Barnaansing.

– Jú, eg hugsi, at serliga vit kvinnur í Føroyum kunna gera munin her, tí vit koma ikki uttanum, at her verða skeivar politiskar avgerðir tiknar. Kanska tí, at tað eru ov fáar kvinnur at leggja dent á tey tungu økini.

Eg vil enda aftur við nøkrum orðum frá bókini hjá Eiler Jacobsen: »Men eg havi altíð havt sum lívsreglu, at hetta bert at halda støðuna er afturgongd. Tí einki standur í stað uttanum okkum.«

Og soleiðis hugsi eg, at tað verður eisini fyri kvinnur í politikki. Eg trúgvi, at tað eru fleiri kvinnur á veg inn í politikk, og um tú brennur fyri somu søk, vil eg eggja tær og siga:

1 Ger tær eitt greitt mál.
2 Virð teg sjálva, fyri tað tú ert.
3 Ver ágrýtin!

Trælaløn!

Marjus Dam
løgtingsmaður Sambandsfloksins

Sera væl skiljandi er útspæl Skipara- og Navigatørfelagsins, at manning teirra, ið er til arbeiðis í sjúkravakt, eigur at fáa sína vanligu grundløn umframt vaktargjald.

Tað líkist púrt ongum, at halda fólk bundin í arbeiði fyri 17 kr og 32 kr/tíman, harav helvtin fer í skatt.

Latið manningina við er til arbeiðis fáa tað løn teir eiga.

Tað er ikki rætt at gjalda teimum trælaløn!